RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

betri

# FORELDRAFUNDUR Í 1. UNDIRVÍSINGARPARTI

– Læraravegleiðing

## Innihald:

Bakgrund
Foreldrafundur

---

## Bakgrund

Við tað at næmingarnir eru ungir, er týdningarmikið, at tey fáa góðar ferðsluvanar og kenna týdningin av teimum. Foreldrini eru tey, sum kunnu geva børnunum góðar ferðsluvanar, og skúlin stuðlar undir við at undirvísa í viðkomandi tilfari.

## Foreldrafundur

Greið frá, hvat tit gera, tá ið tit arbeiða við ferðslu. Foreldrini hava óivað fingið bræv heim við, sum kunnar um Gonguroyndina. Tú kanst greiða frá, hvørjum øðrum tit hava arbeitt við/fara at arbeiða við í hesum undirvísingarparti: Gonguroyndini, Stóra býnum og Pinkuhjálminum.

Vís foreldrunum pinkuhjálmin við egginum, so tey síggja, hvussu týdningarmikið tað er at brúka hjálm.